# Taparar gjørdust vinnarar

**FLOGBÓLTUR** Boban Ilic og Maja Filipovic fingu eina persónliga endurreisn, tá tey gjørdust ársins flogbóltsspælarar




**TEY BESTU**

*Maja Filipovic úr Drátti og Boban Ilic úr Mjølnir vóru kosin ársins spælarar í flogbóltinum í vetur*

*Mynd: Flogbóltssambandið*

Heri Simonsen

Boban Ilic hjá Mjølni og Maja Filipovic hjá Drátti eru tvey ærukær fólk, sum hava givið føroyskum flogbólti nógv. Í ár hevur kortini ikki gingið heilt eftir vild. Boban hevur saman við Mjølni tapt bæði FM-finaluna og steypafinaluna ímóti SÍ, og Maja hevur tapt steypafinaluna ímóti SÍ. Tí gjørdist tað ein kærkomin endurreisn at fáa tað størstu persónligu viðurkenningina, sum ein flogbóltsspælari kann fáa í Føroyum.

### Iðraðu seg

Bæði góvu til kennar, at tey tóku tað sum ein stóran heiður. Boban iðraði seg kortini um, at hann ikki hevði havt spælarnar hjá Mjølni til venjingar javnt og samt. Menn hava verið til skips, og hava verið nógv burtur í arbeiðsørindum, og tað hevur gjørt arbeiðstreytirnar væl tyngri hjá honum.

Maja róðu eisini aftur á ta taptu steypafinaluna hjá Drátti. Hon undirstrikaði kortini, at hennara framtíð liggur í Føroyum og í føroyskum flogbólti.

Flogbóltsfólkini høvdu sett hvørjum øðrum stevnu á Hotel Norð á Viðareiði, sum var sera vælegnað til eitt minniligt gallakvøld. Sjálvur uttanríkisráðharrin sang fyri, og var hýrurin góður alt kvøldið.

*heris@sosialurin.fo*

## FLOGBÓLTSVINNARAR

**Ársins spælarar**
Maja Filipovic, Dráttur
Boban Ilic, Mjølnir

**Ársins blokkarar**
Katrin Petersen, TB
Sune Juul Pedersen, Fleyr

**Ársins stjørnuskot**
Bára Holm Johannesen, TB
Bjarni Larsen, ÍF

**Ársins verjuspælarar**
Margit Joensen, Mjølnir
Johan Petur á Stongum, SÍ

**Ársins hevarar**
Maja Filipovic, Dráttur
Thorvald Danielsen, Mjølnir

**Ársins venjarar**
Gudrid Nolsøe, TB
Ragnar í Haraldsstovu, SÍ

**Ársins álopsspælarar**
Gudrid Nolsøe, TB
Boban Ilic, Mjølnir